# SPENNANDI ÚTBÚGVINGAR





## - eitt hav av vinnumøguleikum ...



### Maskinmeistari

Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta og hægsta tekniska yrkisútbúgving, sum kann takast í Føroyum. Útbúgvingin gevur sera stórar møguleikar, bæði á sjógvi og landi, líkamikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi.

Maskinmeistaraútbúgvingin gevur eisini møguleikar fyri at blíva el-innleggjari. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkur.

Útbúgvingin tekur 3 ár.

Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina er tvær ferðir um árið: í januar og í august.



### Maskinistur

Maskinistútbúgvingin gevur møguleikar fyri at verða maskinstjóri á flestu veiðifórum, sum fiska í føroyskum sjóøki.

Útbúgvingin gevur t.d. eisini rætt til at vera maskinstjóri á skipum við maskinorku upp til 3.000 kW í altjóða sigling.

Útbúgvingin tekur 9 mánaðir.

Upptøka til maskinistútbúgvingina er eina ferð um árið og byrjar í august.



### Skipari

Vinnuháskúlin bjóðar altjóða góðkendar útbúgvingar til skipara og skipsførara, sum geva vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim. Sum skipari kanst tú føra øll fiskiskip um allan heim, eins og farmaskip, upp til 3.000 tons.

Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár.

Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara.



### Skipsførari

Skipsføraraútbúgvingin tekur tilsamans 3 ár; 3 hálvár til skipara og síðani 3 hálvár til skipsførara.

Sum skipsførari kanst tú føra øll skip á øllum høvum.

Upptøka til skipara- og skipsføraraútbúgvingarnar er tvær ferðir um árið: í januar og í august.

Maskinist- og maskinmeistara-, skipara og skipsføraraútbúgvingarnar eru moduluppbygdar.

KREA

Vinnuháskúlin hevur fýra útbúgvingar: Skipara, skipsførara, maskinist og maskinmeistara. Skúlin lýkur STCW krøv. Tí eru útbúgvingarnar á altjóða støði og geva arbeiðspláss kring allan heim. Á starvsstovunum finst øll standard nútímans útgerð. Í dag ganga 180 næmingar á skúlanum.

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · www.vh.fo